ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Nýtt partafelag skal reka formuladeildina hjá B36

**Í kvøld verður aðalfundur í bóltfelagnum B36, og tá verður staðfest, at hetta komandi kappingarárið verður virksemið hjá felagnum rikið í tveimum. Eitt nýtt partafelag skal taka sær av formulaliðnum og øllum tí viðvíkjandi, meðan gamla móðurfelagið skal reka húsið, ungdóms- og kvinnudeildina og alt annað virksemi hjá B36**



*Kristjan á Neystabø, formaður*

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá summarsteðgur var í landskappingini í fótbólti í fjør, var B36 tað felagið, ið hevði størstu útskiftingina, tá fimm spælarar komu til og tríggir fóru frá felagnum. Men tað var ikki bara á vøllinum, at útskifting var í fjørsummar, tí á eykaaðalfundi í B36-húsinum tann 21. juli var øll nevndin í felagnum skift út.

Í staðin fyri ta gomlu nevndina, sum hevði sitið frammanundan, komu Kristjan á Neystabø, formaður, Edvard Heen, næstformaður, og Kjartan Mohr, kassameistari og skrivari, at manna »nýggju« nevndina. Kristjan og Kjartan hava fyrr sitið í áravís í nevndini og teir hava eisini báðir verið formenn í B36.

Men áðrenn teir báðir saman við Edvard Heen tóku við valinum, høvdu teir tryggjað sær undirtøku frá eykaaðalfundinum fyri einari lógarbroyting, ið hevði til endamáls at leggja alt virksemi viðvíkjandi formulaliðnum í annaðhvørt eitt smápartafelag ella eitt partafelag.

Í vetur kom so fram, at B36 hevði rættiliga álvarsligar fíggjarligar trupulleikar at dragast við, og so mikið nógv stóð á, at B36 vendi sær til sínar kreditorar fyri at fáa í lag avtalur um skuldina.

### Leyst av móðurfelagnum

Formaðurin í B36, Kristjan á Neystabø, dylur heldur ikki fyri, at leiðslan í felagnum hesa tíðina hevur brúkt rættiliga nógva tíð til at fáa loyst fíggjarligu viðurskiftini, og eftir øllum at døma hevur hann góð tíðindi at bera ársaðalfundi felagsins, sum verður í kvøld. – Fíggjarligu viðurskifti eru nú komin undir land, sigur hann.

Umframt, at formaðurin á aðalfundinum fer at greiða frá hesum, fer hann væntandi eisini at greiða frá, at nú er klárt er at stovna eitt partafelag, sum skal reka formulaliðið hjá felagnum. Framvegis verður tó alt annað virksemi í felagnum, so sum húsið, ungdóms- og kvinnudeildin, verandi í móðurfelagnum.

Sosialurin skilir, at partapeningurin í nýggja felagnum verður ein millión krónur, og at fleiri partaeigarar verða. Upprunaliga skuldi talan verða um 36 partaeigarar, sum hvør setti 50.000 krónur í nýggja felagið, men nú er tó líkt til, at partaeigararnir kanska ikki verða heilt so nógvir í tali – í øllum førum ikki beinanvegin.

### Sær ljóst upp á 2009

Hóast veturin hevur verið heldur rokaligur hjá nevndini, hevur formaðurin í B36 rímiliga góðar vónir um komandi árið, bæði á vøllinum og uttan fyri vøllin, nú tingini verða umskipað og broytt.

– Alt í alt haldi eg, at tað sær gott út fyri framman hjá B36. Vit eru nøgd við hópin hjá formulaliðnum, sum hann nú sær út, og eisini eru vit fegin um nýggja venjaratoymi, sum skal taka sær av formulaliðnum, sigur Kristjan á Neystabø.

– Vit halda nýggja partafelagið vera eina spennandi broyting og umskipan, ið samanumtikið kemur at gagna samlaða rakstrinum av B36 í framtíðini.

## Umbering til Helga

**Tá vit á forsíðuni í gjár ávístu grein um talvkongin Helga Dam Ziska, kundi ávísingin misskiljast. Helgi segði ikki, at tað »ikki var nóg gott« at vinna meistaraheitið, men at tað var ringt at samanbera við kappingin í Íslandi fyri trimum árum síðani. Vit biðja Helga umbera okkum mistakið**

**blaðstj.**

## Blandaðir og veteranmeistarar í bridge

Um vikuskiftið var nógv virksemið í Bridgehúsinum í Havn, tí tá skipaði Føroya Bridgesamband fyri tveimum føroyameistarakappingum. Fyrst kappaðust níggju blandað pør leygardagin og síðani vóru 14 pør við í kappingini fyri veteranar sunnudagin.

Í FM-kappingini fyri blandað pør endaði tað við, at Maria V. Hansen og Marner Joensen vunnu við 30 stigum. Nummar tvey vóru Anna Olsen og Heðin Mouritsen við 25 stigum og nummar trý Henriette Svenstrup og Oddmar Danielsen við seks stigum.

Hjá veteranunum gjørdust Jens Pauli G. Nolsøe og Danny Danielsen føroyameistarar við 39 stigum. Á øðrum plássi vóru Johannes Skaarup og Marner Joensen við 25 stigum, og á triðja plássi Atli Hansen og Jógvan Ranghamar við 23 stigum.

**hil**



*Marner Joensen og Maria V. Hansen gjørdust leygardagin føroyameistarar í bridge fyri blandað pør*



*Sunnudagin vunnu Jens Pauli G. Nolsøe og Danny Danielsen føroyameistaraheitið í bridge fyri veteranar*